# ARBEIÐSMARKNAÐUR
## á www.portal.fo

Leys støрv, sum verða lýst í Sosialinum, kunnu leggjast út á
**www.portal.fo**
so øll hava møguleikan at síggja lýsingina

**Kostnaður:** (um lýsingin eisini er í Sosialinum)

| | |
|---|---|
| 1 vika | kr. 500,- |
| 2 vikur | kr. 750,- |
| til freistin at søkja er úti: | kr. 1.000,- |

**Kostnaður:** (um lýsingin ikki er í Sosialinum)

| | |
|---|---|
| 1 vika | kr. 750,- |
| 2 vikur | kr. 1.000,- |
| til freistin at søkja er úti: | kr. 1.250,- |

2 lýsingar = -20% í avsláttri
3 ella fleiri = -30% í avsláttri







# 75-100 prosent av alivinnuni um koll

**Havbúnaðarfelagið óttast fyri at millum 75 og 100 prosent av alivinnuni er tekniskt í konkurs og fer fyrsta dagin at steðga upp - eginpeningurin er etin upp av ILA og metlágum prísum.**

ALIVINNA
*Búi Tyri*



*Monrad Dalbú skipsførari plagar av og á at hjálpa til á Bakkafrost*
*Foto: Maria Olsen*

Støðan í alivinnuni er sum heild desperat nú og meginparturin av hesari vinnu fer væntandi á húsagang. So døpur eru útlitini sambært Havbúnaðarfelagið sum eftirlýsir tiltøk frá politiskari síðu og samstundis vísir aftur tankan um beinleiðis almennan stuðul.

Tann væl kenda bakgrundin er at marknaðurin fyri alilaks kollapsaði aftan á við 11. september 2001 og prísirnir hava ein stóran part av tíðini síðani tá ligið niðan fyri framleiðslu kostnaðin. Síðani komu trupulleikarnir av ILA sjúkuni sum steinur oman á byrðu.

Formaðurin í Havbúnaðarfelagnum, Atli Gregersen, gevur stjóranum í Føroya Banka, Jørn Astrup-Hansen, rætt í nógvum av tí hann segði við Sosialin í gjár.

– Støðan í alivinnuni er so ring sum hon ongantíð fyrr hevur verið, sigur Atli Gregersen.

– Hjá meginpartinum av alibrúkunum er eingin eginpeningur eftir og fyritøkurnar eru tekniskt í konkurs. Einstakar eru endurfíggjaðar meðan aðrar longu eru undir banka administratión; restin ekur sum heild niðri á knøunum… Vit mugu rokna við at 75-100 prosent av øllum alifyritøkunum fara at steðga upp.

– Fólk krøkja seg til vónina so leingi tey liva; so leingi virkini formliga ikki eru farin á húsagang, halda menn fram í vónini um at prísirnir skulu hækka ella at okkurt undur skal henda.

## Mugu gera okkara part

Atli Gregersen er á einum máli við stjóran í Føroya Banka um at aliloyvi mugu kunna pantsetast og at útlendskir íleggjarar mugu fáa attraktiv høvi at seta pening í. Hann hartar samstundis tann politiska myndugleikan fyri at reagera so seint við reguleringum ímóti ILA og fyri at seta skattligar karmar sum ikki eru kappingarførir við okkara grannalond.

– Tað almenna eigur at agera við fastari hond her tó uttan beinleiðis peningaligan stuðul. Vit hava fyrireikað eina størri frágreiðing sum í næstum verður løgd fram… Tann stóri trupulleikin er jú ILA í kombinatión við teir lágu laksaprísirnar; hóast vit kanska eru um at basa hesum ILA nú so kunnu avleiðingarnar tó gerast at øll alivinnan fer fyri bakka tá av tornar.

*Men tvær nýggjar kunngerðir eru komnar sum skulu niðurberja ILA og fyribyrgja framhaldandi trupulleikum; er tað ikki positivt?*

– Tíverri er hetta ov lítið, ov seint. Men sjálvandi kunnu vit siga at tað er fyri neyðini at okkurt er gjørt. Koppseting er sera, sera umráðandi nú og fer saman við øllum øðrum sjúku niðurberjingar tiltøkum sum eru framd óivað at viðføra at ILA verður bast. Enn hava okkara myndugleikar tíverri ikki fingið sent nýggja umsókn til ES um undantak til føroyskan laks viðvíkjandi koppseting, hóast vit hava fingið ábendingar um at vit hava góðan kjans at fáa hoyrn fyri okkara søk, um vit bara tillaga ta nýggju umsóknina í mun til ES og tær atfinningar sum vóru í sambandi við ta fyrru umsóknina sum vit lótu inn tá fyri hálvum øðrum ári síðani.

– Fólk mugu hava eina trúgv upp á at tað ber til, at tað kann loysa seg, og hvat viðvíkur útlendskum kapitali so er hetta aikki minst galdandi. Íleggjarar mugu kunna hava eina trúgv upp á føroyska aling og vit kunnu ikki loyva okkum at dríva protektionismu her. Íleggjarar mugu síggja eina meining í at seta pening í og tí mugu avmarkingar í útlendskum eigaraskapi burtur; avmarkingar kunnu ístaðin leggjast inn í treytirnar fyri aliloyvir.

*Pant til peningastovnar í ogn Føroya fólks kann væl ikki vera meiningin?*

– Tað ljóðar so fínt at alibrúk og fiskur eru "ogn fólksins" men hvør hevur ráð til ideologiskt luxus av slíkum slag, spyr formaðurin í Havbúnaðarfelagnum og heldur fram:

– Tað sigur seg sjálvt at treytirnar fyri fígging eru mótsvarandi harðar um peningastovnurin ikki kann fáa trygd í tí stóra vinnuliga aktivinum sum eitt aliloyvi jú er.

*Hvat skulu politikararnir gera nú?*

– Tað er avgerandi at vit sum skjótast fáa semju við ES um koppseting móti ILA. Síðani má alivinnan fáa bøttar karmar hvat møguleikum fyri skattligum frádráttum viðvíkur, eitt nú eftir norskari fyrimynd. Hetta er nógv sunnari enn tað at tað almenna fer at veita peningaligan stuðul til vinnuna.

– Eitt annað haft um beinini á vinnuni er at hon sjálv má gjalda fyri alt eftirlits arbeiðið, og tað er ikki bíligt. Eg havi fingið upplýst at eitt vanligt alibrúk rindar eina hálva millión um árið til hetta, og tað er jú burtur úr vón og viti.

– Tá vit frá føroyskari síðu hava gjørt hvat vit kunnu, er so eftir at vóna at laksaprísirnir fara at hækka. Og tað fara teir uttan iva einaferð, nær tað so verður.


Sosialurin
Gott val
JAVNAÐARFLOKKURIN
Nr. 12 • týsdagur • 20. januar 2004 • 78. árgangur • Kr. 12,00

Jona fegnast um Ellisheimið.
Síða 28-29

50 fólk missa starvi:
Vágur sett 10 ár aftur í tíðina
Síða 6

Hart spæl í Rumenia:
Sveinur úti í ein mánað
ítróttur 33-38

Myndugleikarnir síggja ikki veruleikan í eyguni:
Alivinnan søkkur og tekur nógv við sær

Jørn Astrup Hansen, stjóri í Føroya Banka, sigur seg duga illa at skilja hugburðin hjá politikarunum til kreppuna í alivinnuni. Hann vísir á, at í fleiri ár var góða gongdin í alivinnuni

*Tað var í blaðnum í gjár, at Jørn Astrup Hansen, stjóri í Føroya Banka, gjørdi vart við sera ringu støðuna í alivinnuni*